# Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið

Dagfesting: 09-07-2024

**(Uppskot til)**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024**
(Dagførd kvotutøl og atgongd at fiska í bretskum sjógvi og í norskum sjógvi)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 5 frá 8. februar 2024 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2 verður "65.000 tons" broytt til: "98.708 tons".

**2.** § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Kvota sambært stk. 1 kann fiskast í føroyskum sjógvi, norskum sjógvi, bretskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum."

**3.** Í § 3, stk. 1 verður "44.809 tons" broytt til: "68.535 tons".

**4.** Í § 3, stk. 2 verður "37.784 tons" broytt til: "58.645 tons".

**5.** Í § 4, 1. pkt. verður "17.129 tons" broytt til: "26.585 tons".

**6.** Í § 5, 1. pkt. verður "3.626 tons" broytt til: "5.628 tons".

**7.** Í § 6, 1. pkt. verður "910 tons" broytt til: "1.413 tons".

**8.** Í § 7, 1. pkt. verður "910 tons" broytt til: "1.413 tons".

**9.** Í § 8, 1. pkt. verður "6.297 tons" broytt til: "9.773 tons".

**10.** Í § 9, 1. pkt. verður "1.852 tons" broytt til: "2.874 tons".

**11.** Í § 10, 1. pkt. verður "648 tons" broytt til: "1.006 tons".

**12.** Í § 11, 1. pkt. verður "616 tons" broytt til: "956 tons".

**13.** Í § 12, stk. 1 verður "128 tons" broytt til: "199 tons".

**14.** Í § 12, stk. 2 verður "128 tonsini" broytt til: "199 tonsini".

**15.** Í § 15, stk. 1 verður "2.380 tons" broytt til: "3.695 tons".

**16.** Í § 15, stk. 1 verður "8 ára" strikað.

**17.** Í § 16, stk. 1 verður "5.525 tons" broytt til: "8.390 tons".

**18.** Í § 17, stk. 1 verður "3.287 tons" broytt til: "5.102 tons".

**19.** Aftan á § 18, men áðrenn yvirskriftina yvir § 19, verður sett:

*"Atgongd at fiska makrel í bretskum sjógvi*

**§ 18 a.** Av kvotuni sambært § 3, stk. 1 kunnu føroysk skip fiska upp til 31.054 tons í bretskum sjógvi.
*Stk. 2*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 4, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 12.315 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 3*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 5, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 2.607 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 4*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 6, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 654 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 5*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 7, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 654 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 6*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 8, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 4.527 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 7*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 9, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 1.331 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 8*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 10, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 466 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 9*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 11, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 443 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 10*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 12, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 92 tons.
*Stk. 11*. Fiskiskapur av kvotuni sambært § 15, stk. 1 er í bretskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 1.712 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 15.
*Stk. 12*. Fiskiskapur í bretskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 16, stk. 1, sum er lagdur um sambært § 10 í løgtingslógini, er avmarkaður til í mesta lagi 3.332 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 13*. Fiskiskapur í bretskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 17, stk. 1, sum er latin sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. er avmarkaður til í mesta lagi 403 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 17.
*Stk. 14*. Fiskiskapur í bretskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 17, stk. 1, sum er latin sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. er avmarkaður til í mesta lagi 1.348 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað

hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 17.
*Stk. 15.* Fiskiskapur í bretskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 17, stk. 1, sum er latin sambært § 49, stk. 2, er avmarkaður til í mesta lagi 1.167 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í bretskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 17.
*Stk. 16.* Veiða í bretskum sjógvi sambært stk. 2-15 verður roknað av kvotuni, sum fiskifarið eigur lut í sambært §§ 4-12 og §§ 15-17.
*Stk. 17.* Eru líkindi fyri, at atgongdin at fiska kvotuna sambært stk. 1 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin við fráboðan umskipa rættin til atgongd til bretskan sjógv.
*Stk. 18.* Skiparin skal fylgja teimum reglum, sum galda fyri fiskiskap eftir makreli fyri fiskifør undir føroyskum flaggi í bretskum sjógvi.

*Atgongd at fiska makrel í norskum sjógvi*

**§ 18 b.** Av kvotuni sambært § 3, stk. 1 kunnu føroysk skip fiska upp til 35.191 tons í norskum sjógvi.
*Stk. 2.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 4, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 14.140 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 3.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 5, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 2.994 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 4.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 6, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 751 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 5.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 7, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 751 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 6.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 8, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 5.198 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 7.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 9, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 1.529 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 8.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 10, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 535 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 9.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 11, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 509 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 10.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 12, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 106 tons.
*Stk. 11.* Fiskiskapur av kvotuni sambært § 15, stk. 1 er í norskum sjógvi avmarkaður til í mesta lagi 1.965 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 15.
*Stk. 12.* Fiskiskapur í norskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 16,

stk. 1, sum er lagdur um sambært § 10 í løgtingslógini er avmarkaður til í mesta lagi 3.825 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum egna árskvotan.
*Stk. 13.* Fiskiskapur í norskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 17, stk. 1, sum er latin sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. er avmarkaður til í mesta lagi 1.548 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 17.
*Stk. 14.* Fiskiskapur í norskum sjógvi av tí parti av kvotuni sambært § 17, stk. 1, sum er latin sambært § 49, stk. 2, er avmarkaður til í mesta lagi 1.340 tons. Atgongdin at fiska kvotuna í norskum sjógvi verður tillutað hvørjum rættindahavara í sama lutfalli sum rætturin av kvotuni sambært § 17.
*Stk. 15.* Veiða í norskum sjógvi sambært stk. 2-14 verður roknað av kvotuni, sum fiskifarið eigur lut í sambært §§ 4-12 og §§ 15-17.
*Stk. 16.* Eru líkindi fyri, at atgongdin at fiska kvotuna sambært stk. 1 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin við fráboðan umskipa rættin til atgongd til norskan sjógv.

**§ 18 c.** Sambært avtalu við Noreg kunnu í mesta lagi 12 skip fiska makrel í norskum sjógvi í senn.
*Stk. 2.* Skip, sum ætla sær í norskan sjógv at fiska sambært hesi kunngerð, skulu innan dd.mm.2024, kl. xx søkja Vørn um fiskiloyvi. Eru fleiri enn 12 umsóknir, verður lutakast millum innkomnu umsóknirnar um raðfylgjuna at sleppa í norskan sjógv. Í fyrstu atløgu sleppa 12 tey fyrst drignu skipini við tilsøgn frá Vørn í norskan sjógv.
*Stk.* 3. Fer fiskifar ikki til fiskiskap í norskum sjógvi innan 24 tímar eftir, at Vørn hevur givið tilsøgn um at byrja fiskiskap, fellur tilsøgnin burtur, og næsta skipið á listanum tekur yvir.
*Stk. 4.* Fiskifar, sum hevur fingið loyvi frá Vørn at fiska makrel í norskum sjógvi, kann vera har til nøgdin, fiskifarið hevur atgongd til at fiska í norskum sjógvi er uppi, ella til Vørn staðfestir, at fiskifarið ikki hevur boðað frá veiðu ella avreiðing seinastu 60 tímarnar.
*Stk. 5.* Sambært avtaluni við Noreg, sum loyvir føroyskum skipum at fiska 35.191 tons av føroysku makrelkvotuni í 2024, skal allur makrelur, sum føroysk skip veiða í norskum sjógvi ella við Jan Mayen, seljast gjøgnum ella við góðkenning frá Norges Sildesalgslag.
*Stk. 4.* Skiparin skal fylgja teimum reglum, sum galda fyri fiskiskap eftir makreli fyri fiskifør undir føroyskum flaggi í norskum sjógvi.”

**20.** § 19, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu bert byrja fiskiskap í bretskum sjógvi, norskum sjógvi ella í NEAFC-skipanarøkinum, um Vørn hevur váttað, at tey eru á lista yvir fiskifør, sum Bretland ella Noreg hava givið loyvi at fiska í teirra sjóøki, ella eru fráboðað NEAFC at fiska í NEAFC- skipanarøkinum.”

**21.** § 40 verður orðað soleiðis:

“**§ 40.** Fiskifør, sum fiska sambært hesi kunngerð, skulu senda hesar fráboðanir til Vørn sambært skjali 1:
1) Fráboðan um, at fiskiskapur byrjar. Tá farið verður í bretskan sjógv, norskan sjógv ella í NEAFC-skipanarøkið, skal fráboðanin sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið kemur inn í bretskan sjógv, norskan sjógv ella í NEAFC-skipanarøkið.
2) Veiðifráboðan hvønn dag. Hvønn fyrrapart, áðrenn kl. 12 UTC, skal boðast frá veiðu fyri undanfarna

samdøgur. Fráboðanin skal sendast, hóast eingin veiða er fingin.
3) Fráboðan um, at fiskiskapur endar. Tá farið verður úr bretskum sjógvi, norskum sjógvi ella NEAFC-skipanarøkinum, skal fráboðanin sendast, í fyrsta lagi 6 tímar og í seinasta lagi 2 tímar, áðrenn skipið fer úr bretskum sjógvi, norskum sjógvi ella NEAFC-skipanarøkinum.

*Stk. 2.* Fiskifør, sum fiska í bretskum sjógvi sambært hesi kunngerð, skulu senda fráboðan til bretskar myndugleikar, sum nærri ásett í skjali 2 til hesa kunngerð."

**22.** Skjal 1 í kunngerð nr. 5 frá 8. februar 2024 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024 verður orðað sum ásett í skjali 1.

**23.** Skjal 2 verður sett sum skjal 2 í kunngerð nr. 5 frá 8. februar 2024 um at skipa fiskiskapin eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, xx. juli 2024

**Dennis Holm**
landsstýrismaður

/ Elin Mortensen